VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Fleyr til gul av útsynningi, seinnapartin upp í stívt andøvsgul av landsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 8 og 11 stig.



Veðrið hósdagin:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, seinnapartin upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og sirm ella mjørki í støðum. Hitin millum 5 og 8 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 6 og 10 stig.

Konsert fyri Blákross

Leygarkvøldið 8. november verður ein stór stuðulskonsert í Vesturkirkjuni til frama fyri nýtt Blákrossheim. Tey, sum luttaka, eru Jens Lisberg, Martin Joensen, Kristel Lisberg og VOX

KONSERT
Tíðindaskriv

Tað er lagt upp til eitt sera spennandi og fjølbroytt konsertkvøld í Vesturkirkjuni leygarkvøldið.

Martin Joensen er kendur fyri sínar sera vælskrivaðu sangir, sum í teksti og orðum hava nomið flest øll. Martin skrivar sangir um lívið, og hann nemur í yrkingum sínum við nógv djúp og viðkomandi evni.

Jens Lisberg hevur sungið seg inn í nógv hjørtu. Við sínum heilstoypta country konsepti rakar hann ein sera breiðan skara av føroyingum. Á konsertini spælir hann saman við góðum tónleikarum, og vit kunnu gleða okkum at hoyra hvat teir borðreiða við.

Kristel Lisberg er ein av okkara bestu sangkvinnum, og hon hevur, hóast sín unga aldur, drúgvar royndir at standa á palli. Kristel fer á konsertini eisini at syngja gospel saman við gospelkórinum VOX, sum er eitt av føroya bestu gospelkórum.

Konsertin er klokkan 20.00 leygarkvøldið 8. november. Tað er ókeypis at koma á konsert, men høvi verður at lata eina peningagávu.

Stuðulskonsertin er til frama fyri eitt nýtt blákrossheim, sum ætlanin er at byggja á Gadd á Nesi.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-8
Nuuk	-2
Qaqortoq	0
Ammassalik	-2
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	4
Seyðisfjørður	7
Tórshavn	9
Lerwick	7
Aberdeen	5
London	7
Tromsø	--
Bergen	5
Oslo	--
Stokkhólm	3
Keypmannah.	6
Helsinki	2
Moskva	9
Berlin	7
Warzawa	16
Kiev	12
Bukarest	13
Paris	10
Madrid	11
Róm	20
Malorca	21
Athen	22
Malta	23
Tunis	25
Beijing	17
New Dehli	29
Bangkok	32
Jakarta	32
Sydney	--
New York	18
Miami	25
Los Angeles	21
Meksikobýur	--
Panama	25
La Paz	14
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	28

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár;
Eitt hátrýst, 1025 hPa. við Hetland fer eystureftir. Eitt lágtrýst, 973 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer norðureftir og dýpist.



Í dag:
Hátrýstið yvir Suður-Noreg stendur mestsum í stað. Stormlágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga norðureftir og kuldabrúgvin sunnan fyri Ísland kemur spakuliga hendavegin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 1/11 kl. 06^{00} – 2/11 06^{00}. Hitin í gjár: 8,2°
Minsti hiti máldur í november: -4,0° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/11 kl. 06^{00} – 2/11 06^{00}.
Avfallið higartil í november: 0 mm

Alt um harmonikur

www.simme.eu

VESTFALLSKYRRINDI

28. oktobur	Tendring
2. novembur	Mánin longst frá jørðini
6. novembur	Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
4. nov	11:05	23:26	10:05	22:26	10:20	22:41	0:44	13:05	1:44	14:05	9:20	21:41	8:20	20:41	11:20	23:41	-	12:20	10:50	23:11	-	12:05
5. nov	11:46	-	10:46	23:06	11:01	23:21	1:26	13:46	2:26	14:46	10:01	22:21	9:01	21:21	-	12:01	0:41	13:01	11:31	23:51	0:26	12:46
6. nov	0:06	12:39	11:39	-	11:54	-	2:06	14:39	3:06	15:39	10:54	23:28	9:54	22:28	0:21	12:54	1:21	13:54	-	12:24	1:06	13:39
7. nov	1:13	13:46	0:13	12:46	0:28	13:01	3:13	15:46	4:13	16:46	-	12:01	11:01	23:34	1:28	14:01	2:28	15:01	0:58	13:31	2:13	14:46
8. nov	2:19	14:38	1:19	13:38	1:34	13:53	4:19	16:38	5:19	17:38	0:34	12:53	11:53	-	2:34	14:53	3:34	15:53	2:04	14:23	3:19	15:38